## Arbeiðseftirlitið
### søkir løgfrøðing



Okkara løgfrøðingur hevur tikið við nýggjum avbjóðingum og tí er eitt áhugavert starv sum løgfrøðingur á Arbeiðseftirlitinum leyst at søkja.

Høvuðsarbeiðsøki er at gera uppskot til lógir, kunngerðir, leiðreglur v.m., at ráðgeva stjóranum og starvsfólkum á stovninum. Harafturat kemur málsviðgerð og samskifti við virki, borgarar og myndugleikar í málum, sum hava samband við tað virksemið, sum Arbeiðseftirlitið umsitur. Eisini umfatar starvið undirvísing og kunning fyri virkjum og pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

Starvið, sum Arbeiðseftirlitið bjóðar, er í einum spennandi og góðum arbeiðsumhvørvi, har trygd, heilsa og trivnaður er umráðandi, og við sjálvstøðugum, avbjóðandi og tvørfakligum uppgávum, ið geva tær møguleika fyri fakligari og persónligari menning. Samstarvað verður við Vinnumálaráðið.

**Setanartreytir**

Vit ynskja, at umsøkjarin hevur løgfrøðiligt embætisprógv og helst royndir innan almenna fyrisiting. Somuleiðis er neyðugt at hava teldukunnleika á brúkarastøði, at skriva rætt føroyskt á ein lættskiljandi hátt og annars at duga væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis.

Starvið er tíðaravmarkað til eitt ár við møguleika fyri leingjan, um løgfrøðingurin í farloyvi ikki kemur aftur. Miðað verður eftir, at seta starvið skjótast til ber og er starvið lønt sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Karl Joensen, stjóra á tlf. 357811 ella um Arbeiðseftirlitið á heimasíðu www.arb.fo.

**Umsókn**
saman við prógvi og møguligum viðmælum skal sendast til Arbeiðseftirlitið, Falkavegur 6, 100 Tórshavn og vera stovninum í hendi í seinasta lagi
**24. januar 2007.**

Arbeiðseftirlitið | Falkavegur 6 - 100 Tórshavn
tlf. 35 78 11 - fax. 35 78 10 - www.arb.fo

## LÆRARI TIL KOLLAFJARÐAR SKÚLA

Søkt verður eftir einum lærara fyri lærara í barnsburðarfarloyvi í tíðarskeiðnum 29. mars – 27. juni 2007.

**Lærugreinir:**
støddfrøði í 2. og 3. flokki
tilevning og heimstaðarlæru í 1., 2. og 3. flokki
handarbeiði í 4. – 6. flokki
serundirvísing

**Aðrar uppgávur:**
flokslærari í 2. flokki

Tann, ið settur verður, skal hava læraraútbúgving. Um eingin við útbúgving søkir, verður annað fólk sett í staðin.

Starvið er fulltíðarstarv og er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

Eru spurningar, eru tit vælkomin at venda tykkum til skúlaleiðaran, Karin Hammer, á tlf. 30 25 53 ella 22 14 07 ella á teldupostbústaði karin.hammer@skulin.fo

Umsókn saman við CV, avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mikudagin 24. januar 2006 kl. 12.00.

**Kollafjarðar skúli**
**Botnavegur 2**
**FO-410 Kollafjørður**

Í Kollafjarðar skúla ganga í løtuni 144 næmingar í 1. til 9. flokki. 14 lærarar starvast í skúlanum. Kollafjarðar skúli er ein eitt-sporaður skúli við 9 árgangum. Vit arbeiða í 3 deildum við einum lærarатoymi í hvørjari deild. Býtt er soleiðis: 1.-3. flokkur, 4.-6. flokkur og 7.-9. flokkur.

# Handilshøli ynskist til keyps ella leigu

Stødd: 125 - 250 m²

Yvirtøka: eftir avtalu

(kann bíða upp til ½ ár, um hølið er tað rættað)

***Bill. mrk. 0607005***

Veitst tú eina góða?

Ring til Sosialin tlf 341800



## LÆRARI TIL HOYVÍKAR SKÚLA

Søkt verður eftir lærara frá 1. februar og restina av skúlaárinum. Starvið er 26 undirvísingartímar í tveimum toymum:

4. flokkur: flokslærari, føroyskt, enskt, danskt og stuðul.

7. flokkur: føroyskt.

Lønt verður eftir sáttmála við fíggjarmálastýrið.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving og royndum skulu sendast til:

Hoyvíkar Skúla
Postrúm 3073
110-Tórshavn

Umsóknir skulu vera okkum í hendi seinast hósdagin 25. januar klokkan 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlastjóran á tlf 302590 ella 227603.

*Birgit Arge*
*Skúlastjóri*
*Hoyvíkar Skúli*

Í Hoyvíkar Skúla ganga 465 næmingar.
37 lærarar starvast í skúlanum.

Hoyvíkar Skúli